## Tobbi spyr um landsliðið

Eftir at HSF hevur gjørt greitt, at fíggjarumstøðurnar ikki loyva enn eini luttøku í altjóða undankapping hjá manslandsliðnum, hevur Tórbjørn Jacobsen sett Helenu Dam á Neystabø fyrispurning um, hvørja støðu mentamálaráðið hevur til føroyska altjóða luttøku. Tingmaðurin vil hava at vita, hvør ítróttarpolitikkurin hjá landsstýrinum er, hvønn týdning landsstýriskvinnan heldur altjóða luttøkuna hava fyri føroyskan ungdóm. Og um landsstýrið hevur ætlanir um at gera tað fíggjarliga møguligt hjá HSF at melda til undankappingina.



## Liverpool keypirJovanovic

Serbiski landsliðsspælarin hjá belgiska liðnum, Standard Liege, Milan Jovanovic hevur skrivað undir ein trý ára sáttmála við Liverpool, hetta skrivar enska blaðið, The Guardian. Sambært The Guardian verður Milan Jovanovic tøkur hjá Liverpool, tá komandi kappingarár byrjar. Venjarin hjá Liverpool, Rafael Benitez vildi hava ein framherja tøkan longu tá flytingarvindeyga læt aftur tann 31. januar. Nú má Benitez so bíða til komandi kappingarár byrjar, áðrenn hann fær gleði av tí serbiska framherjanum.



Sí-kvinnurnar høvdu alla orsøk til at frøast í gjárkvøldið, tá tær vunnu tryggan sigur á Fleyr, sum nú hevur mestsum mist sín finalumøguleika

Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### SÍ-Fleyr 3-1 (25-17, 25-27, 25-13, 25-15):

# SÍ aftur á slóðina

**Tað tók ikki langa tíð hjá SÍ-kvinnunum at koma fyri seg eftir tapið fyri TB sunnudagin. Í gjárkvøldið gjørdist talan um tryggan sigur á Fleyr, ið gleið enn longur burtur frá FM-finaluni**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Treytirnar eru harðar, skal Fleyr koma í finaluna, sum ger av, hvør verður føroyameistari í Eik-liguni hjá kvinnum. Fleyr skal vinna allar dystirnar, sum eftir eru, samstundis sum TB og Mjølnir skulu tapa í øllum førum tveir dystir í part. Hóast liðið hjá Fleyr á pappírinum er eitt tað frægasta við fleiri landsliðsspælarum, so sæst tað bara ikki aftur á vøllinum.

Í gjárkvøldið vóru havnarkvinnurnar í Sørvági, har tað eydnaðist heimaliðnum at vinna trygt. SÍ vísti í løtum sera gott spæl, ið avspeglar oddasessinum, men aðrar løtur dovnaði liðið og vísti einki. Í teimum løtunum tók Fleyr av viðhvørt, men verri enn so altíð…

Serliga í fyrsta setti var eingin ivi og SÍ vann trygt. Hinvegin hevði Fleyr sína bestu løtu í øðrum setti, har liðini fylgdust tað nógva av tíðini, og Fleyr at enda hevði settbólt við støðuni 24-23. Men SÍ javnaði og fór framum, og hevði løtu seinni eisini settbólt, tá tað var 25-24. Men Fleyr yvirlivdi, vann teir báðar næstu bóltarnar og vann settið.

### SÍ var klárt betri

Nú skuldi møguleikini verið har at vent dystinum, men í staðin var tað aftur SÍ, ið fór avstað. Triðja sett var vunnið trygt, men tað gjørdi ikki støðuna betur hjá Fleyr, at Karina Debes noyddist út við skaða, tá SÍ var á odda 25-13. Og í fjórða setti tóktist tað, sum var luftin farin fullkomuliga úr útiliðnum, ið einki maktaði, men tapti greitt.

Samanumtikið var SÍ klárt betra liðið, sæð yvir allan dystin. Kvinnurnar úr Sørvági høvdu góðar servur og gott verjuspæl, meðan Fleyr stóð seg syndarliga illa í móttøkunum, so sjálvt lættir bóltar sluppu at detta niður, uttan at nakar fór eftir teimum ella fekk teir.

SÍ fekk staðfest, at liðið framvegis megnar meira enn hini, hóast tapið sunnudagin fyri TB var ein strika í rokningini. Tó var tann strikan ikki størri enn so, at SÍ væl og virðiliga reistist aftur og nú er trý stig framm-an fyri nummar tvey.

### Dráttur-KÍF 3-0 (25-9, 25-11, 25-12):

# Tað tók ein tíma

Sum so ofta fyrr í vetur, var trettandi dysturin hjá unga KÍF-liðnum ikki serliga drúgvur. Tað tók Drátti ein tíma at vinna 3-0 í ítróttarhøllini á Giljanesi í gjárkvøldið, og spenningurin var púrt eingin.

Mest dramatiska løtan var beinanvegin í fyrsta setti, tá hevarin hjá Drátti, Maja Popovic, var áhaldsin og koykti sær fótin. Hon mátti lata seg skifta út og kom ikki innaftur.

Hetta var annars ein dystur, har fleiri av teimum føstu sluppu at hvíla seg, og aðrar sluppu framat, men tað vísti seg ikki at gera mun, tí Dráttur vann trygt – enntá tað nógva upp á servurnar

**hil**

### Mjølnir-ÍF 3-1 (25-13, 25-17, 24-26, 25-18):

# Mjølnir framvegis við

Kvinnurnar hjá Mjølnir liggja framvegis og lúra aftan fyri tey bæði fremstu liðini í Eik-liguni, og enn livir vónin um at fáa tikið finalusessin frá annaðhvørt TB ella SÍ. Í gjárkvøldið var ÍF á vitjan, og burtur sæð frá triðja settinum, var eingin ivi um, hvat av liðunum var tað betra.

Gjøgnumgangandi fyri øll settini var, at liðini fylgdust ta fyrstu løtuna, men at Mjølnir so fór avstað. Undantakið var triðja sett, har Mjølnir var á odda 24-21 og bara ein bólt frá settinum, tá ÍF brádliga gjørdi ein vørr og fekk hálað teir síðstu fimm bóltarnar inn og vunnið settið.

Hvøkkurin sat ikki fastari enn so, at Mjølnir kom aftur á slóðina í fjórða setti. Sigurin merkir, at Mjølnir yvirhálaði TB við einum stigi og nú aftur er nummar tvey, men tó við einum dysti meira. Her er enn einki avgjørt, og hóast tað skilist á lagnum, at Mjølnir missir onkrar spælarar til síðstu dystirnar, er liðið framvegis við heilt har frammi.

**hil**